Vilhelm Johannesen, tingmaður Javnaðarfloksins:

# Tað gongur yvirhøvur ikki

**Tingmaður Javnaðarfloksins Vilhelm Johannesen sigur, at tað gongur als ikki at leggja Dúgvuna. Eisini sigur hann at verandi ferðaætlan hjá Sam als ikki hjálpir til, har tað leikar harðast á um Leirvíksfjørð**

LEIRVÍKSFJARÐARLEIÐIN

*Solby A. Eliasen*

– Ternan og Sam fara als ikki at megna at nøkta tørvin um Leirvíksfjørð, sigur Vilhelm Johannesen, sum eisini fílist á ferðaætlanina hjá Sam, sum hon er nú.

– Sam siglir slettis ikki, tá fløskuhálsurin um Leirvíksfjørð er, sigur hann. Og her meinar hann við teir báðar fyrstu túrarnar av Klaksvík á morgni og so út á seinnapartin av Leirvík. Tá eru flest fólk og bilar við, tí fólk fara og koma aftur hesar tíðirnar. Sambært ferðaætlanini hjá Sam, so siglir hann fyrsta túrin av Leirvík klokkan hálvgum níggju á morgni og seinasta túr av Klaksvík klokkan eitt korter til fýra. Men tó skal líka sigast, at tað kemur fyri, at Sam tekur onkrar eykatúrar, um tað er neyðugt. Men ferðaætlanin sigur so nakað annað.

– Handa ferðaætlanin hjá Sam er óbrúkilig, tí hann ikki siglir, tá tað største trýstið er á, sigur Vilhelm, og leggur afturat, at flutningstørvurin um Leirvíksfjørð er øktur so nógv.

Vilhelm vísir á, at hóast undirsjóvartunnilin verður veruleiki um nøkur ár, so merkir tað ikki, at alt kann steðga upp inntil tá.

– Vit skulu liva inntil tunnilin kemur, sigur Vilhelm, sum eisini er greiður yvir, at bildekkið umborð á Dúgvuni trongir til ábøtur. Hann hevur eisini hoyrt tos um at selja Dúgvuna.

– Tað er ørskapur at selja Dúgvuna, áðrenn undirsjóvartunnilin er komin um Leirvíksfjørð, sigur norðoya tingmaður Javnaðarfloksins, sum sjálvur nýtir leiðina so gott sum hvønn dag.

Jákup Mikkelsen, tingmaður hjá Fólkaflokkinum:

# Dúgvan verður ikki løgd

**Jákup Mikkelsen sigur uttan at fara í smálutir, at hann er næstan 100 % vísur í, at Dúgvan ikki verður løgd**

LEIRVÍKSFJARÐARLEIÐIN

*Solby A. Eliasen*

Tingmaðurin og vinnulívsmaðurin Jákup Mikkelsen er sannførdur um, at arbeiðið við málinum u m Dúgvuna fer at koma við tí loysn sum skal til fyri at fáa Dúgvuna at halda fram við at sigla.

– Tað kann undir ongum umstøðum góðtakast, at Dúgvan verður løgd nú, sigur hann.

– Norðoyingar kunnu ikki liva við einum tænastustøðið, sum er á hædd við tað til Sandoynna, sigur Jákup Mikkelsen.

Spurdur um, hann hevði tikið undir við at skjerja játtanina til Strandferðsluna so nógv, um hann visti, at tað fór at raka lívsæðrina til Norðoyggjar, svarar Jákup, at tað at Strandferðslan skal spara ikki merkti, at tænastustøðið á Leirvíksfjarðarleiðini skuldi lækka.

Harafturat sigur Jákup, at vinnulívið í Klaksvík hevur boðað Strandferðsluni frá, at Sam er óbrúkiligur til leiðina og tað endamál hann er settur til.

– Tað er ivasamt um Sam siglir ein vetur afturat, so vinnulívið hevur heitt á Strandferðsluna um at lata Ternuna og Dúgvuna røkja siglingina um Leirvíksfjørð heldur enn Sam, sigur Jákup.

Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni:

# Eg lagi meg eftir eini politiskari avgerð

**– Mínir møguleikar viðvíkjandi Dúgvuni eru sera avmarkaðir, men um ein politisk avgerð kemur um, at hon ikki skal leggjast, so lagi eg meg sjálvandi eftir henni, sigur strandferðslustjórin**

LEIRVÍKSFJARÐARLEIÐIN

*Solby A. Eliasen*

Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni sigur, at so longi sum ongin politisk avgerð er tikin um, at Dúgvan ikki skal leggjast, so verður hon løgd fyrst í apríl mánaði.

Arbeitt hevur annars verið við at útvega annað skip til leiðina um Leirvíksfjørð, men tað er sera trupult at finna eitt skip, sum er størri enn Dúgvan, og sum sleppur inn í Leirvík.

– Vit fingu eitt tilboð upp á eitt skip mikudagin, men tað vísti seg tíverri, at tað ikki sleppur inn í Leirvík, so tað fór í vaskið, sigur Kristian, sum undirstrikar at tosið um at selja Dúgvuna og Sam bara er íkomið, um tað fór at eydnast Strandferðsluni at finna eitt annað skip til Leirvíksfjarðarleiðina.

Við at leggja Dúgvuna fer Strandferðslan at spara 1,8 milliónir. Harafturat sigur Kristian Davidsen, at Dúgvan hevur víst seg at vera ein risikofaktor, tá tað kemur til viðlíkahald.

– Vit hava havt stórar viðlíkahaldsútreiðslur av Dúgvuni seinastu trý árini, sigur hann.

Strandferðslustjórin sigur annars, at alt tos um at spara, hevur verið í samstarvi við Vinnumálaráðið, og harvið vísir hann aftur tosinum um, at hann skal hava lagt eftir Leirvíksfjarðarleiðini bevíst.

At enda sigur hann, at hann fær onki gjørt. Sostatt verður Dúgvan løgd, um ikki ein politisk avgerð kemur um tað mótsatta.

– Hon verður helst ikki løgd í komandi viku, men í kanska í aðru viku aftur, sigur Kristian Davidsen at enda.



*Henda túrin sluppu allir bilarnir við, hóast tríggir trailarar og ein lastbilur stóðu í røðini*

*Mynd: Jens K. Vang*

# Dúgvan ella Ternan

**Leirvíksfjarðarleiðin er ein tann mest nýtta farleiðin í landinum. Og nú fer hon eisini at merkja sparingarnar hjá Strandferðsluni. Sosialurin hevur verið ein túr umborð**

LEIRVÍKSFJARÐARLEIÐIN

*Solby A. Eliasen*

Klokkan er eitt korter yvir eitt, teir seinastu bilarnir koyra umborð á Dúgvuna, og so er klárt at fara frá. Á bildekkinum, sum er fult, standa einir tríggir trailarar, ein bilur hjá IRF og fleiri persónbilar.

Umborð er fitt av fólki, og flestu stilla seg beinanvegin í røð at keypa ferðaseðil. Hóast nógv rokilsi er um hesa ferjuna fyri tíðina, so gongur gerandisdagurin sína vanligu gongd. Ongin veit tó at siga, hvussu longi Dúgvan fer at røkja siglingina um Leirvíksfjørð afturat.

Men tað tykist at vera breið semja millum ferðafólk, at tey heldur vilja hava Dúgvuna enn Ternuna.

– Ternan var góð tann tíð tað var, men hon er ov lítil til leiðina í dag, heldur eitt ferðafólk fyri.

Tey allarflestu hava sum so onki ímóti Ternuni, men tey siga, at hon er so nógv minni. Serliga eru nógv færri sitipláss umborð á Ternuni.

Og tá tað kemur til bilar, tá er munurin eisini stórur. Áðrenn uppmerkingin á bildekkinum á Dúgvuni kom, tók hon 37 bilar, men tá bleiv hvør bilur vaskaður av ferðafólkunum, sum mugu ganga eftir dekkinum. Ein uppmerking varð so gjørd til tess at betra um hetta, men tað førdi samstundis við sær, at hon tekur einar seks ella sjey bilar færri. Ternan er ikki uppmerkt, so hon tekur einar 30 persónbilar. Men tá eru somu fortreytir ikki galdandi fyri skipini bæði.

Tá tað kemur til størri akfør, verður sagt frá Dúgvuni, at tað er ongin trupulleiki at hava fimm trailarar og so nakrar lastbilar afturat við á einum túri. Tað er nakað,sum slettis ikki letur seg gera umborð á Ternuni. Og er hetta ein av størstu orsøkunum til, at øði er komin í vinnulívið í Norðoyggjum. Tað veit, at Ternan merkir longri bíðitíð, tí hon ikki hevur sama kapasitet, sum Dúgvan, serliga tá tað kemur til størri akfør.

Tosið gongur lívliga bæði umborð og á landi, og flest allaðstaðni siga fólk, at tey vilja síggja tað, áðrenn tey trúgva tí, at Dúgvan veruliga verður løgd.

Í Leirvík gongur skjótt fyri seg, og á túrinum aftur til Klaksvíkar er bildekkið ikki fult, so ikki kann annað sigast enn, at tað merkist, at Sam siglir eisini.

Á veg aftur til Klaksvíkar hittast Sam og Dúgvan á Galvinum, men møguliga eru dagarnir tá hesar báðar ferjurnar hittast í Leirvíksfirðinum taldir. Um stutta tíð, verða tað kanska Ternan og Sam, sum røkja farleiðina.

Komin aftur til Klaksvíkar standa aftur nógvir bilar og bíða eftir ferjuni. Trailarar, lastbilar og persónbilar hvør um annan. Kanska sleppa allir við - kanska ikki, men so vita førararnir, at tað gongur bert ein hálvur tími, so er Sam aftur í Klaksvík.



*– Dúgvan hevur nógv fleiri sitipláss enn Ternan, eru flest øll ferðandi á einum máli um*

*Mynd: Jens K. Vang*



*Í dag tekur Dúgvan um 30 persónbilar. Tað er serliga tá hugsað verður um tey størri akførini, at Dúgvan verður søgd at vera tað betra skipið*

*Mynd: Jens K. Vang*

# Vit vilja hava Dúgvuna

**Sosialurin var umborð á Dúgvuni ein dagin og tosaði við fólk, sum nýta hesa farleiðina so gott sum hvønn dag. Tey eru øll á einum máli um, at Dúgvan er tað betra skipið til Leirvíksfjarðarleiðina**

*Solby A. Eliasen*

*Óluva Klettskarð, lærari við studentaskúlan í Hoydølum:*



– Eg haldi so avgjørt, at Dúgvan er tað betra skipið til hesa farleiðina. Ternan er ikki egnað, tí har eru so fá sitipláss. Tað er meira enn so komið fyri, at eg havi staðið túrin yvirum, sigur Óluva Klettskarð, sum hevur ferðast ímillum í góð fýra ár. Hon sigur somuleiðis, at Dúgvan er nógv sjóbetur enn Ternan.

– Ternan rullar illa, og tað er nógvur gangur umborð. Harafturat er trongt á bildekkinum. Tað er blivið munandi betur umborð á Dúgvuni, men tað er sera trongt umborð á Ternuni, sigur Óluva.

– Tá okkurt óvæntað er, um ein skúlaflokkur skal yvirum, so merkist tað beinanvegin umborð á Ternuni, sigur Óluva, sum ikki heldur tað vera rímuligt, at tænastustøðið um Leirvíksfjørð versnar.

Hon heldur ikki, at ein bara kann lasta Strandferðsluni fyri hetta.

– Politikararnir hava eisini ábyrgd yvir fyri hesum, heldur Óluva Klettskarð.

*Jacob Meinhard Sólbjørg, fólkaskúlalærari í Klaksvík:*



– Mær dámdi sera væl Ternuna í byrjanini, men tá so Dúgvan kom, og eg hevði ferðast við henni í eina tíð, so helt eg, at hon er tað betra skipið til ferðafólkini, sigur Jacob Meinhard Sólbjørg, sum hevur ferðast aftur og fram í yvir 20 ár.

Hann heldur eisini, at Ternan er verri fyri fólk, sum hava eitt hvørt brek.

– Trappurnar eru nógv betur at koma upp ígjøgnum umborð á Dúgvuni, og harafturat eru øll ferðafólkini á somu hædd.

Tað er so ræðuliga skjótt, at tað verður ov fult í erva í Ternuni og í neðra er so nógvur gangur, sigur Jacob Meinhard, sum heldur, at tað verður ein vanlukka fyri ferðsluna, um Dúgvan verður løgd.

– Ternan megnar ikki at nøkta tørvin, og eg haldi so avgjørt, at tíðin er farin frá Sam, sigur Jacob Meinhard Sólbjørg.

*Christian, Benjamin og Snorri, skúlanæmingar á Kambsdali:*



– Vit vilja so nógv heldur hava Dúgvuna, siga teir tríggir, sum ferðast dagliga um Leirvíksfjørð.

Teir siga, at nú hava teir siglt við Ternuni í eina tíð, tí hon sigldi fyri Dúgvuna í eitt tíðarskeið herfyri.

– Ternan fyllist við fólki beinanvegin, og salongin í neðra er onki at reypa av. Har er so nógvur gangur, siga teir.

– Eg havi ongantíð havt nakað í móti Ternuni, men tá hon røkti siglingina herfyri, sá eg, hvussu nógv verri umstøðurnar fyri ferðafólkini eru har umborð í mun til Dúgvuna, sigur Snorri.

Teir tríggir siga eisini, at Ternan er nógv meira órólig í sjónum enn Dúgvan.

– Um nakað positivt skal takast fram um við Ternuni, so er tað innkrevjingin, tí har ganga teir runt, siga teir tríggir skemtandi.